## Ragnvaldur til EM

17.-21. august fara tey menningartarnaðu at kappast um evropameistaraheitið í svimjing í pólska býnum Ostrowiec Swietokrzyski. Úr Føroyum verður ein luttakari við. Tað er 18 ára gamli Ragnvaldur Jensen, sum áður fleiri ferðir hevur verið við til kappingar uttanlands við góðum úrslitum. Venjari hjá Ragnvaldi er Tóra Øre Hansen. Hetta er fyrstu ferð, at føroyingur hevur kvalifiserað seg til EM. Ragnvaldur var tó við í kappingina um heimsmeistaraheitið í 2007. Í Pólandi verður Ragnvaldur við í 50 m, 100 m og 200 m í bæði bringusvimjing og frí svimjing.

## Paul Ince vil hava tíð

Nýggi venjarin hjá Blackburn, har Gunnar Nielsen hevur spælt seinasta árið, vil fegin hava meira tíð til at fáa neyðugu úrslitini. Hann loysti av Mark Hughes í venjarasessinum í summar, og fyrireikingarnar eru nú komnar at enda, áðrenn Premier League byrjar aftur leygardagin. Ince staðfestir, at órógv er í skiftirúminum, og at hann ikki kann góðtaka atfinningarnar mótvegis honum. – Vit hava ikki fingið arbeiðsfrið, tí fólk fegin vilja geva okkum trupulleika. Tað er hvørki rætt ella fair, sigur Ince við The Sun.

# við braki



*Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, hevði ikki nógvar orsøkir til at síggja annað enn ivingarsamur út, tá lið hansara, Lyngby, longu eftir einum hálvleiki var aftanfyri heili 4-0*

hjá felagnum, ið vit eru í ferð við at byggja upp.

Í hesum sambandi nevnir Todi, at tað kanska ikki var so galið, at liðið flutti niður í fjør, tí tað hevur givið møguleika fyri at bygt nakað upp við nýggjari manning, og at stórur áhugi tí var fyri felagnum síðsta kappingarár, tá liðið mestsum alla tíðina var á odda í næstbestu deildini og vann dystir.

At so byrjanin hetta kappingarárið gjørdist so góð, sum hon var tað leygardagin, ger tað bara enn stuttligari hjá Toda Jónsson at sita í stjórastólinum í FC Amager.

### Henrik var vónbrotin

Eitt skifti á føroyska landsliðnum var Henrik Larsen venjari hjá Toda Jónsson. Hesir spældu eisini saman í síni tíð í bæði Lyngby og FC Keypmannahavn. Men hóast tað, so var tað ikki løgið hjá fyrrverandi føroyska landsliðsvenjaranum at tapa ímóti Toda.

- Nei, tað hugsaði eg ikki um. Eg hugsi bara um mítt og Lyngby. Tað hevði ikki verið meira løgið, um mótstøðuliðið var eitt annað, staðfestir Henrik Larsen.

Mett út frá dystinum á Sundby Idrætspark, hvussu metir tú so framtíðina hjá FC Amager verða?

- Tað sær í øllum førum ljóst út. Samansetingin av teimum royndu og yngru leikarunum riggar væl. Eg eri sannførdur um, at teir ikki fara at stríðast í botninum í hesum kappingarárinum. Tað verður neyvan nú, at teir verða í heiðursmerkjastríðnum, men teir fara at liggja har um, sigur Henrik Larsen, sum skal royna at vinna Lyngby aftur í bestu donsku deildina.



*Hóast FC Amager í ljósabláum er uppflytari úr 2. deild og Lyngby í reyðum er niðurflytari úr Superliguni, so endaði FC Amager við at vera omaná í sínum fyrsta dysti í Viasatdeildini*

